# TILTØK

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Jóhan Syderbø um evnið »Orð Jesusar á krossinum (4)« og á tilbiðjanarmøtinum talar Jógvan Zachariassen um »Nehemias: maðurin við góðum Gudi«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn og bíbliutími, undirvísing um Opinberingina. www.livdin.fo

**Samkoman Rhema**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20-22 JC Teens.
Leygarkvøldið kl. 22 Bønarnátt.
Sunnumorgunin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Á møtinum verður biðið fyri sjúkum. www.rhema.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jóhan P. Johannesen. Evnið: At bíða í tolni.
Leygarkvøldið bøn í býnum kl. 21.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jóhan P. Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

**Hebron, Argir**
Í kvøld kl. 20 verður bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar um Ísak og Rebekku (1. Mós. 24). Ein hin vakrasta myndin av Kristusi og samkomuni. www.hebron.fo

**Ebenezer**
Mikudagin kl. 17.30 Awana fyri børn í 1., 2. og 3. flokki. Kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 Kvinnu- og Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 21 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Siloakórið luttekur. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, kl. 17.30 Títtlingasangur, kl. 18.30 Barnarøddir venja, kl. 19.30 Menn samlast.
Hósdagin Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.
Sunnudagin kl. 11 Møti, familjutímin byrjar við drekkamunni aftaná flaggdagsskrúðgonguna kl. 16. Skótarnir skipa fyri.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.

Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Ver her og vak við mær. Vak og bið«!

**Meinigheitshúsið**
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Leygardagur kl. 9.30-12 Foreldur og børn hittast.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti v/ Jákubinu og Kim Hansson.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Bøn, kl. 19 Delli.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Rúna Rasmussen »Hvør er Jesus«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Møti v/ Kurt Christensen, kl. 11.50 ABC v/ Jacobinu Jacobsen, evnið: »Dópurin í Heilaga Andanum« 2. partur, kl. 18 Familjumøti.
www.filadelfia.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Húsbólkarnir møta í kvøld kl. 20 hjá Nicolinu Hansen og Maivør Jacobsen.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

Mánadagin kl. 17 TIM 5, kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Mikukvøldið kl. 20 Felags húsbólkamøti.
Leygarkvøldið Opið hús kl. 21 við Símun Absalonsen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj. Evangel. møti kl. 19. Barnamøti kl. 11. Vælkomin í Kelduna.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Betania, Skopun**
Í kvøld kl. 20 Bønarmøti. Vælkomin í Betania.

**KFUM & K, Klaksvík**
Mikudagin kl. 20 Bíbliutími v/ Hanus Lassen matt. kap. 11.
Fríggjakvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Øssur Kjølbro, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnaløta fyri ung.
Sunnumorgunin kl. 11 Møti.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Frelsunarherurin í Vági**
Í kvøld kl. 19 Juniorsoldátamøti.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20 Uppbygg. fundur.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 19. apríl***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30 Veving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl
**Enn eru nøkur pláss eftir til Norratúrin 2.-10. aug. saman við sandoyingum. Tilmeld. 316491**
***Týsdagur 20. apríl***
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Frásøgn, Jákup Lindenskov
***Mikudagur 21. apríl***
kl. 10-12 Skeið í hekling, Marita Thorsteinsson.
kl. 15 Vitja framsýningina í Lítluvík
***Hósdagur 22. apríl***
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldufprát, Brandur Petersen
kl. 14 Fundur fyri pensioneraðum sjúkrasystrum
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 23. apríl***
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14-17 Skeið í hekling, Marita Thorsteinsson

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 21. apríl***
Tórálvur Mohr Olsen: Endurminningar frá krígnum.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 1*5-18.
***Mánadagin 19. apríl***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Týsdagin 20. apríl***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 21. apríl***
Hugnaløta v/ Mejnhardt og Judith
***Hósdagin 22. apríl***
Prát og sangur
***Fríggjadagin 23. apríl***
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.




## KONFIRMATIÓN

Sunnudagin 25. apríl verður Gunleif Mouritzen, sonur Mohrid Johansen og Bent Mouritzen, konfirmeraður í Gelsted kirkju. Adr.: Søndergade 43, DK 5591 Gelsted.

Sunnudagin 2. mai kl. 10.15 verður Arnóra Davidsen, dóttir Oddvør og Andras Davidsen, Miðvágur, konfirmerað í Vindum kirkju. Konfirmatiónin verður hildin í Nørrelanggade 6A, st. 8840 Rødkærskro.

Tann 7. mai kl. 10 verður Teitur Vágseið, sonur Sonju og Johan Vágseið í Vági, konfirmeraður í Hedager kirkju í Herning. Adr.: Snejbjergvej 18, Studsgård, 7400 Herning.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 24. apríl kl. 15.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Hallfríð Hammer, Toftir og Rúni í Hjøllum, Saltnes. Kl. 18.00 verður borðhald fyri innbodnum á Sjómansheiminum í Runavík. Eftir kl. 21 Opið hús hjá Klement Hammer, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 22. mai kl. 13.00 giftast í Ebenezer, Tórshavn, Synnøve Hatlehol av Vatne, Noreg og Danjal av Rana, Tórshavn. Brúðarveitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at vera við, verða biðin um at boða frá á tlf. 312850 ella á maibryllup@hotmail.com áðrenn 5. mai.

12. juni giftast Hallgerð Poulsen og Brian Bjartalíð. Vígslan verður kl. 13.00 í Kristnastovu, Birmavej 36, 2300 København S. Veitslan verður á Moltkes Palæ, Dronningenstværgade 2, København K. Tey, sum ynskja at gleða okkum við at koma, biðjast vinarliga ringja á tlf. 0045 21912901 eftir kl. 18 innan 1. mai 2004.

## SILVURBRÚDLEYP

28. apríl 2004 hava hjúnini Annika og Kristian Olsen, Saltnes verið gift í 25 ár. Dýra biðidag 7. mai kl. 13.30 verður veitsla hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, sum vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 448319 ella 222402 innan 24. apríl.



Skála-HB:

# HB hevur stóra virðing fyri Skála

**Alexandur Johansen heldur munin millum Skála og HB higartil í ár hava verið royndirnar og ikki so nógv styrkin í fótbóltsspælinum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Í kvøld klokkan 18.30 verður fyrsta bríkslið í 2004 landskappingini. Skála tekur ímóti meistarunum úr HB. Í hølunum á havnarmonnunum er eitt upptøkulið hjá TV2. Ørindini hjá teimum í Føroyum eru at fylgja Heine Fernandez, nú hann er givin í superliguni og er vorðin venjari í Føroyum. Um tað verður mett út frá steypakappingini, so verður Fernendez í HB álopinum í kvøld.

Liðformaðurin hjá HB, Rúni Nolsøe, sigur seg hava stóra virðing fyri mótstøðumonnunum:

- Eingin dystur er léttur og als ikki teir á útivølli. Vit hava spælt tvær ferðir ímóti Skála, og ikki minst í Gundadali næstsíðsta vikuskifti vórðu vit mintir á, at tað skal ansast eftir teimum.

Ta ferðina vann HB 3-2, eftir at Skála hevði verið frammanfyri 2-1, inntil tað bara restaði ein lítil løta.

- Ímóti VB vunnu vit leygardagin 6-0. Munurin millum tann dystin og so tann ímóti Skála var tann, at vit ímóti VB fingu mál burtur úr møguleikunum. Ímóti Skála høvdu vit fleiri møguleikar, men vit misnýttu nógvar møguleikar, staðfestir Rúni Nolsøe.

Martin Christensen er tøkur aftur, eftir at hann hevur ligið sjúkur. Bárður Johannesen fer ikki at verja HB málið nógvu tær fyrstu vikurnar, Hans á Lag er eisini langtíðar skaddur, og tað er ivasamt, um Símun Eliasen, sum er skaddur í hondini, verður førur fyri at spæla. Ímóti VB vóru Vagnur Mohr Mortensen og Rasmus Nolsøe í miðverjuni.


*Mikukvøldið verður fyrsti dysturin í landskappingini leiktur, og millum áskoðararnar á Skála verður eitt sjónvarpslið frá danska TV2*

### Royndirnar á muni

Eins og allir hinir á Skála vónar Alexandur Johansen, at úrtøkan fer at verða størri nógvu tey fyrstu umførini, enn hon hevur verið tey fyrstu árini í bestu deildini. Hann ásannar, at tað er stór avbjóðing at fáa meistararnar á vitjan í fyrsta umfarinum. Men samstundis heldur hann ikki uppgávuna vera heilt ómøguliga.

- Tá ið vit taptu 3-2 í Gundadali, høvdu teir fleiri møguleikar beinanvegn. Men so fingu vit høvdið fyri okkum, og vit høvdu takið á miðvøllinum stóran part av tíðini. At vit ikki megnaðu at halda tørn um 2-1 leiðsluna, haldi eg hevur við rutinuna at gera. HB eigur nógvar spælarar við drúgvum royndum. Hóast teir flestu okkara hava spælt í bestu deildini í tvey ár, so haldi eg, at tað fyrst og fremst eru royndirnar, sum eru á muni millum teir og okkum.

Á Skála er stór kapping um málverjuplássið. Igor Bjarni Kostic er komin úr Íslandi at verja málið. Men unglingaspælarin Heini Kristiansen hevur givið honum so stóra kapping, at Johan Nielsen hevur bíðað inntil í kvøld at gera av, hvør skal verja málið. Igor var sannur brandur í Gundadali, men á Eiði leyardagin var Heini aftur í málinum. Hann hevði ikki spælt seg av, og venjarin gav honum nýggjan møguleika. Eugen Voda, sum hevur verið málverji, er nú venjari hjá hinum báðum.

Iulian Florescu og Nenad Stankovic sótu smáskaddir uttanfyri, og Alexandur Johansen hevur verið plágaður av, at annar fóturin hevur fingið snudd. Roknað verður við, at teir allir tríggir verða á Skála liðnum í kvøld.

Rúni Rasmussen, sum higartil í ár hevur spælt við NSÍ, vandi mánakvøldið fyrstu ferð við Skála.

# Í OB hava teir virðing fyri Toda

**Jákup á Borg sigur, at liðfelagarnir høvdu heldur viljað havt Zuma sum mótstøðumann enn Toda, sum er á FCK liðnum í kvøld**

STEYPAKAPPINGIN Í DANMARK
*Jóannes Hansen*

Í kvøld verður farið undir hálvfinalurnar í donsku steypakappingin. Talan er mest sum um toppdystir. Esbjerg er fokið, men annars eru tað bestu liðini í superliguni, sum bresta saman. Brøndby hevur heimavøll ímóti AaB, sum teir á sama vølli sunnudagin vunnu 4-0 ímóti. Tað ferðina varð sagt, at AaB spardi seg til í kvøld. Nú fæst at síggja, hvussu tað verður við tí.

Í Parkini skal OB royna at telva seg til so góða útgangsstøðu undan heimadystinum, sum tað ber til. Todi Jónsson er í fimtan manna hópinum hjá FCK. Hann telvast um tvey álopspláss saman við Álvaro Santos og Jesper Bech. Tað kann væl vera, at tað verður pláss fyri teimum øllum ímillum teir fyrstu ellivu.

Jákup á Borg er ikki í OB ferðalagnum. Hann hevði kanska væntað ella rættari vónað, at hann fór at fáa boð, men hann er tolin og bíðar:

- Steen Nedergaard, sum plagar at vera síðuspælari, er skaddur. Chris Sørensen, sum OB hevur keypt úr Vejle, hevur verið í vinstra borði, men nú hava teir flutt hann yvir í hina síðuna. Eg hevði vónað, at eg kanska kundi fáa møguleikan, men eg havi framvegis gott mót.

Í vikuskiftinum spældi Jákup á Borg í Danmarksseriuni á útivølli ímóti B1921. OB vann 3-1. Jákup var vongverji í høgru, og hann heldur, at tað gekk væl hjá honum.

### Virða Toda

At tað kann ganga skjótt at sleppa framat, hóast vánirnar ikki síggja nakað serligar út, er støðan hjá Toda Jónsson í FCK gott dømi um. Fyri tveimum vikum síðani roknaði Todi seg sum fimta mann í kappingini um tey bæði álopsplássini. Nú tykist hann vera sjálvskrivaður í hópinum. Hetta veit Jákup á Borg, og hann veit eisini, at liðfelagarnir hjá honum hava stóra virðing fyri føroyska álopsspælaranum í FCK:

- Tað verður tosað um hálvfinaluna, tá ið vit venja. Liðfelagarnir hjá mær siga, at teir nógv heldur høvdu viljað havt Zuma sum mótstøðumann enn Toda. Tað kemur ikki óvæntað á meg, men eg skilji á teimum, at virðingin fyri Toda er rættuliga stór. Í OB siga teir, at Todi er ein tann mest kompletti álopsspælarin í superliguni. Teir umrøða hann sum sterkan, skjótan og tryggan. Eg veit, at Todi er góður og vandamikil, men eg kann ikki ynskja honum alt tað besta í hálvfinaluni. Tá haldi eg sjálvsagt við mínum felag, og eg hevði einki havt ímóti, um eg fekk høvi at spæla ímóti Toda í seinna hálvfinaluni.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Mikudagin 21.04. kl. 20$^{00}$
Mikudagin 21.04. kl. 22$^{15}$
Hósdagin 22.04. kl. 20$^{00}$
Hósdagin 22.04. kl. 22$^{15}$




Mikudagin 21.04. kl. 19$^{30}$
Hósdagin 22.04. kl. 19$^{30}$




Mikudagin 21.04. kl. 22$^{00}$
Hósdagin 22.04. kl. 22$^{00}$
– *Seinasta sýning*




Mikudagin 21.04. kl. 17$^{30}$
Hósdagin 22.04. kl. 17$^{30}$




Mikudagin 21.04. kl. 17$^{15}$
Hósdagin 22.04. kl. 17$^{15}$
– *Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
Fríggjadagin 23.04. kl. 18$^{00}$
Fríggjadagin 23.04. kl. 20$^{45}$
Fríggjadagin 23.04. kl. 23$^{30}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**